UTTAN ÚR HEIMI

## Leita eftir vápnum

Í Eysturríki leita myndugleikar og brotsmenn eftir vápnum í teimum nógvu vøtnunum í fjallalendinum. Sum vera man hava myndugleikarnir og brotsmenninir ikki sama endamál, men tað, sum leitað verður eftir, er tað sama. Báðir partar vita, at á hesum leiðum liggja fleiri túsund tons av gomlum vápnum frá seinna heimsbardaga.

Tað hevur leingi verið alment kent, at týskararnir tveittu eina av rúgvu av sínum vápnum í vøtnini, tá teir góvu seg yvir, og at amerikanarar, bretar, russar og fransmenn gjørdu tað sama, tá teir fóru úr Eysturríki.

Eysturríksku myndugleikarnir siga, at tey flestu vápnini endaðu í vøtnum í landspartinum Karnten har suðuri í landinum. Higartil hava myndugleikarnir funnið granatir, riflur, brandbumbur og lóður, og ætlanin er at halda fram við leitingini til tess at forða fyri, at brotsmenn skulu fáa fatur á vápnunum.

## Vænta prestatrot

Kirkjumyndugleikarnir í Noregi bera nú ótta fyri, at um ikki so langa tíð verða ov fáir prestar í Noregi. Víst verður á, at meðalaldurin á teimum virknu prestunum er í hægra lagi, og at ov fáa fáa sær guðfrøðiútbúgving.

Sambært einari uppgerð var meðalaldurin á norsku prestunum 49 ár seinasta ársskiftið. Samstundis vísir tað seg, at kirkjan kann ikki vænta at fáa fleiri enn 39 nýklaktar prestar um árið tey næstu árini, meðan framrokningar vísa, at tørvur er á 56 nýggjum prestum um árið tey næstu átta árini.

Eigil Morvik í norsku kirkjuleiðsluni sigur, at eydnast tað ikki at fáa fleiri at lesa guðfrøði ella at fáa fráfarnar prestar at taka starvið uppaftur, verður prestatrot um fá ár.

## Átak ímóti alkoholi

Myndugleikarnir í Iran hava gjørt av at steingja fimm matstovur í býnum Isfahan, tí tær hava skonkt sterkt. Maðurin, sum eigur matstovurnar, er varðhaldsfongslaður.

Blaðið hjá iransku stjórnini skrivar, at løgreglumenninir løgdu hald á 150 fløslur av rúsandi løgi á teimum fimm matstovunum. Alkohol hevur verið bannað í Iran síðani kollveltingina í 1979, og brot á lógina verða vanliga sektað við fongsli ella bót.

Kortini hevur tað víst seg, at nógvir iranar drekka sterkt við hús, og at nógvur rúsandi løgur verður smuglaður inn í landið bæði eystan- og vestaneftir.

## Bjarga Deyðahavinum

Myndugleikarnir í Jordan og Ísrael eru vorðnir samdir um eina verkætlan, sum hevur til endamáls at bjarga Deyðahavinum.

Deyðahavið er minkað nógv seinnu árini, men nú ætla jordanar og ísraelsmenn at leiða vatn úr Reyðahavinum í Deyðahavið. Ætlanin umfatar eina røtleiðing, sum er mett at kosta einar seks milliardir krónur. Rørleiðingin verður einar 320 kilometrar long.

Seinnu árini er vatnstøðan í Deyðahavinum fallin umleið ein metur um árið.

# Ætlaði at stoyta flogfarið niður í London



*Hetta flogfarið hjá írska flogfelagnum Ryanair skuldi sambært álítandi keldum stoytast niður yvir amerikansku sendistovuna í London*

*Mynd: Reuters*

**Tann 29 ára gamli Kerim Chatty, sum varð tikin á einum flogvølli í Svøríki, ætlaði helst at stoyta eitt flogfar niður í amerikansku sendistovuna í London**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Bretska tíðindastovan Reuters sigur seg hava fingið at vita frá vælvitandi keldum, at tann 29 ára gamli Kerim Chatty ætlaði at ræna eitt flogfar hjá felagnum Ryanair og at stoyta tað niður í London. Málið var eftir øllum at døma tann amerikanska sendistovan í bretska høvuðsstaðnum.

Karim Chatty varð tikin í floghavnini í svenska býnum Vesterås, eftir at eftirlitstólini høvdu avdúkað, at hann hevði eina skammbyrsu í einari tasku, sum hann skuldi hava við sær í eitt flogfar hjá Ryanair, sum skuldi til London og haðan itil Birmingham. Tað vísti seg, at skammbyrsan var lødd, og svenska ákæruvaldið kravdi í gjár, at maðurin skal sita í varðhaldinum fjúrtan dagar afturat, meðan málið verður kannað til botns.

Keldur hjá amerikansku fregnartænastuni hava eisini latið leka út, at Kerim Chatty ætlaði at ræna flogfarið og at søkja at einum máli í London. Men CIA avsannaði tíðindini, tá ovastin fyri svensku trygdarløgregluni, Margareth Linderoth, segði, at einki hald var í upplýsingunum.

Men bæði Reuters og sunnudagsblaðið News of the World halda uppá, at tann tikni ætlaði at ræna flogfarið og at søkja at London. Báðir miðlarnir siga seg hava fingið at vita frá bretskum trygdarkeldum, at amerikanska sendistovan í London var álopsmálið. Keldurnar hava eisini víst á, at hevði flogfarið dottið niður á amerikansku sendistovuna, hevði ein stórur NATO-bygningur í grannalagnum eisini fingið skaða.

Umleið 2.000 fólk arbeiða í tí stóra amerikanska sendistovubygninginum í London.

Reuters visti í gjár at siga, at løgreglan í Svøríki og aðrastaðni leita eftir fýra monnum, sum samstarvaðu við Kerim Chatty.

# Powell orkar ikki meiri

**Tann hóvligi amerikanski uttanríkisráðharrin er settur til viks í stjórnini, har heykarnir ráða. Nú orkar hann ikki meiri**

USA
*Árni Joensen*

Tíðarritið Time vil vera við, at Colin Powell, uttanríkisráðharri er vorðin so ørkymlaður av tí vánaliga stevinum í amerikansku stjórnini, at hann ætlar at leggja frá sær, tá Bush fer at stilla upp til næsta forsetavalið, sum verður í 2004.

-Nú er nóg mikið. Hann orkar hetta ikki longur, skrivar Time frá einari keldu, sum stendur uttanríkisráðharranum nær.

Eygleiðarar siga, at velur Powell at fara frá, er tað ein týðandi og avgerandi sigur fyri tær konservativu kreftirnar í amerikanaku stjórnini við Dick Cheney, varaforseta og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra á odda. Avgerðin verður eisini ein týðilig staðfesting av høgrarákinum, sum hevur merkt amerikanskan politikk, síðani Bush-stjórnin tók við.

Hinvegin er eingin ivi um, at tað hevði komið Evropa illa við, leggur Powell frá sær, tí hesumegin Atlantshavið er hann væl umtóktur. Hetta kemst m. a. av, at hann alla tíðina hevur lagt dent á, at tað er umráðandi hjá USA at leita sær stuðul í altjóða politikki. Harafturat hevur hann verið tann av amerikansku leiðarunum, sum hevur gingið undan í royndunum at fáa frið millum ísraelsmenn og palestinar. Powell hevur eisini sagt seg ivast í ætlanini hjá Bush, Cheney og Rumsfeld at leypa á Irak.

Politiskir eygleiðarar í Washington siga, at seinastu tíðina hava teir sonevndu heykarnir í stjórnini trýst Colin Powell til viks, soleiðis at tað í veruleikanum eru Dick Cheney og Donald Rumsfeld, sum stýra uttanríkispolitikkinum saman við John Aschroft, løgmálaráðharra og Karl Rowe, sum er ráðgevi hjá Bush. Teir eru talsmenn fyri einum meiri harðrendum amerikanskum uttanríkispolitikki.

Time skrivar, at bara eitt veruligt diplomatiskt frambrot í kreppuni í Miðeystri kann fáa Colin Powell at umhugsa at halda fram - fyribils í hvussu er.




Spennandi størv
í Keypssamtøkuni
í Dr. Jakobsensgøtu

*Vit sóknast eftir fólkum til handil okkara:*

**Varaleiðara**

**Vit kunnu bjóða tær:**
... eitt spennandi starv, har tú fært høvi til at vísa tíni evnir og hugflog,
... ein handil, við góðum rakstri og nógvum spennandi møguleikum,
... eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi,
... løn eftir avtalu og m.a. førleika.

**Vit vænta okkum av tær:**
... kanst hava ábyrgd av at handilin altíð er til reiðar at taka í móti kundum,
... kanst standa á odda og menna starvsfólkaliðið í handlinum,
... kanst skipa fyri góðari kundarøkt,
... dámar at taka av avbjóðingum og hava nógv at gera,
... sjálvstøðug/ur, ábyrgdarfull/ur og kanst skifta millum arbeiðsuppgávurnar í handlinum,
... hevur kunnleika til handilsyrkið.

**Starvsfólk til Frukt- og grønmetisdeildina og Blómudeildina**

**Vit kunnu bjóða tær:**
... eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
... eina deild í framhaldandi vøkstri og alla tíðina við nýggjum avbjóðingum og broytingum
... eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi
... góða løn eftir avtalu og førleika

**Vit vænta okkum av tær:**
... at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt við fjølbroyttum hugflogi
... at tú kanst arbeiða bæði innan- og uttandura
... at tú framhaldandi kanst skapa eina spennandi, tiltalandi, nøktandi og kundavinarliga deild, sum í dag hevur sera gott orð á sær.

**...og meira um bæði størvini:**
**Setan:** Skjótast gjørligt eftir avtalu
**Løn:** Sambært avtalu.

Meira fæst at vita um størvini, við at støkka inn á gólvið ella ringja á tlf. 311320 ella 217598 og fáa eitt prát við leiðarin **Bo Møller**.

Skrivlig umsókn saman við viðkomandi skjølum, skal vera okkum í hendi innan **12. september 2002** og skal stílast til:

**FK-Tórshavn**
Att.: Bo Møller
Dr. Jakobsensgøta 6 · Boks 349
110 Tórshavn

**KEYPSAMTØKAN**
**Dr. Jakobsensgøta**

Broytingar

**Suðuroyarleiðin**

**Leygardagin 7. sept. siglir Smyril soleiðis:**

Í sambandi við landsdystin millum Føroyar-Skotland leygardagin tann 7. sept. kl. 15.00, siglir Smyril soleiðis:

kl. 06:00 av Drelnesi **(til Tórshavn)**
kl. 08:30 av Tórshavn **(til Drelnes)**
kl. 11:00 av Drelnesi **(til Tórshavn)**
kl. 14:00 av Tórshavn **(á Toftum kl. 14:30)**
kl. 17:30 av Toftum **(á Havnini kl. 18:00)**
kl. 20:00 av Havnini **(eftir ferðaætlan)**

Upplýsingar um ferðaætlanina fáast á rutuupplýsingini á tlf. 343030.

Víst verður eisini til heimasíðu okkara á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS




FAROE LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við
Eyðfinn Jacobsen,
advokat
ella
Kára á Rógvi,
adv. fulltrúa
um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo






**Toyota Hiace**

2,4 diesel, árg. 09/2000, km. 23.000, til sølu fyri 136.000 kr. + mvg.

**Tlf. 227922**

ADC
ARBEIÐSHANDSKAR
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL




**Fólk søkist**

til fast starv til kvøldið og vikuskiftini.

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
mánadag-hósdag 19.00-23.30
fríggjadag, leyg- og sunnudag 13.00-19.00

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

www.sosialurin.fo